**Nám X**
**Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 11/2014: Uppskot til samtyktar um at endurskoða tingmannalønirnar**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Ungdómstingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot um at broyta løgtingslógina um tingmannalønir soleiðis, at tingfólk verða tímalønt.

**Viðmerkingar**
Uppskotið snýr seg um at broyta løgtingslógina um tingmannalønir soleiðis, at tingfólk verða tímalønt. Hetta skal skiljast soleiðis, at tey verða lønt eftir arbeiðstíð – s.s. uppmøting til tingfundir og nevndarfundir.

Okkara fólkavaldu umboð eiga at ganga fremst í øllum málum. Eisini tá ræður um arbeiðsmoral og arbeiðstíð.

Signalvirðið, ið Løgtingið sendir í øllum viðurskiftum, eigur tí ikki at undirmetast.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Jákup A. Henriksen | Teitur J. Sigvardsen | Petur S. Thomsen

Boas H. Heinesen | Ronja Weihe | Knútur Jóannesarson

Sveinur M. Nolsøe | Vensil Djurhuus | Fríði Slættalíð

Linda Fosaa